# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heilsupolitiskt framstig

Í dag kemur nýggja roykilógin í gildi. Lógin tryggjar øllum rættin til roykfrítt umhvørvi innandura. Hetta merkir, at ikki er longur loyvt at roykja innandura á almennum støðum m.a. matstovum, dansi- og skeinkistøðum, almennum og privatum arbeiðsplássum, skúlum, hallum, dagstovnum, dagrøktum og støðum annars, har almenningurin hevur atgongd. Tað man nú vera almenn semja um, at royking so væl sum passiv royking er heilsuskaðilig. Vísindaligar rannsóknir hava fyri langari tíð síðan víst, at royking ikki bert er krabbameinselvandi, men at royking eisini er orsøk til nógvar aðrar sjúkur og vánaligan trivnað. Tað er sera umráðandi at verja børn móti skaðiligari ávirkan frá royking, og tí mugu vit geva landsstýrismanninum í heilsumálum rætt, tá hann lýsir roykilógina sum eitt stórt fólkaheilsupolitiskt framstig, og eitt stig á leiðini at tryggja øllum føroyingum eitt heilsubetri lív.
Lógin er tó ikki heilt fundamentalistisk og loyvt verður í heilt serligum førum at gera undantøk frá roykiforboðnum. Her verður serstakliga hugsað um pláss, sum eru privatur bústaður og arbeiðspláss, t.d. á ellis- og røktarheimum. Tað verður ikki loyvt at lýsa við tubbaksvørum ei heldur at lata tubbaksvørur sýna fram á sjónligum støðum í handlum. Hetta er gott og man hava breiða undirtøku í fólkinum.

Tað fara altíð at vera ymsar meiningar um, hvat gagnar mest forboð ella upplýsing.
Her hava okkara myndugleikar so valt forboðsleiðina eins og yvirhøvur er gjørt í Noðurlondum og í Bretlandi. Vit skilja væl, at henda loysn er vald, men vit loyva okkum samstundis at gera vart við, at forboð einsamalt er ikki nóg mikið í hesum føri. Her skal annað og meira til, um heilsupolitiska málið, nevniliga at minka um roykingina og harnæst, at árgangirnir hjá teimum, sum eru født í 2000 og seinni, skulu verða roykfríir, skal røkkast. Her skulu eisini gerast vælfyrireikað átøk í dagstovnum, í fólkaskúla og í miðnámsskúlunum. Hetta krevur neyvt samstarv millum ymsar myndugleikar eitt nú Mentamálaráðið, Almanna- og heilsumálaráðið og kommunurnar. Sostatt restar enn tað stóra takið í hesum máli. Hesi átøk skulu fyrireikast her og nú. Løgting og landsstýri mugu vísa vilja til at játta tað, sum hesi átøk fara at kosta. Neyðug játtan er heilt einfalt fortreytin fyri, at hetta stórfingna heilsupolitiska átak skal eydnast. Hepnast hesi átøk ikki, so er lítið gagn í eini forboðslóg.

**Sosialurin**

## Vís sjómonnum okkara størri virðing



**VINJARD JOHANSEN**
Eykamaður
Miðflokksins

Eg taki ikki undir við sjónarmiðinum hjá Torbjørn Jacobsen og landstýrinum um at taka sjómannafrádráttin burtur. At taka frádráttin frá sjómanninum er tað sama sum at leggja flotan og leggja eina byrðu afturat á tann privata arbeiðsgevaran, sum hevur tað trupult at manna skipini. Vit fara eisini at síggja sjómenn flyta av landinum av hesi orsøk, tí man hevur fleiri fyrimunir sum sjómaður í t. d. Norra.

Størsta vinnan hjá okkum eigur at fáa virðing. Skal tann meinigi borgarin, og skulu privatar fyritøkur klára seg í framtíðini, eiga vit at halda fast við høvuðsvinnuna, sum hevur stóran týdning fyri land okkara.

Fyri at borgarar skulu trívast sum sjómenn, eiga vit at geva okkara sjófólki góðar sømdir og karmar, hesum fyri at virða okkara sjómenn, fyri tað ið teir eru fyri land okkara.

Vit áttu at sæð hetta sum ein góðan stuðul fyri landið, og heldur roynt at hildið fast við manningina á skipunum og fingið áhugan upp hjá ungum røskum monnum fyri sjólívinum.

Landið hevur brúk fyri hesari vinnu og fólki, og sjálvandi skal tað hava sín fyrimun, fyri tann sum váðar lív sítt á havinum, og er burtur frá familju stóran part av árinum.

Bátar fara undir veiðu í dag undirmannaðir, av tí at arbeiðsmegi ikki er til vinnuna. At taka frádráttin frá hesari vinnu fer ikki at hjálpa til at finna væntandi arbeiðsmegi.

Eg haldi, at man átti at kunna seg meira um tann praktiska partin av vinnuni, og ikki bert teoretiska partin, aðrenn man úttalar seg um slík mál.

Føroyar hava brúk fyri sjómanninum, og sjómaðurin hevur uppiborið góða virðing frá løggevandi valdinum.

So leingi sum at tað ikki er áhugavert hjá fólki at arbeiða innan fiskivinnuna, so hava vit ongan møguleika at menna fiskivinnuna til eina framkomna vinnu, sum er framman fyri onnur lond. Tað er stór synd at vit ikki satsa upp á vinnuna, sum okkara land hvílir á. Tí tað er eingin loyna, at fiskivinnan hevur eitt risa stórt potentiale.

Lat sjómenn fáa betri kor at arbeiða undir, so teir støðast í vinnuni.

## Hoyrdi eg rætt?



**JÓNA MORTENSEN**

Skerjing av játtanini til børn við serligum tørvi.

Nú skal sparast enn meira á økinum hjá teim veiku næmingunum. Eg má spyrja, "hvat skal sparast"? Tað hevur, mær vitandi, altíð verið ov lítið av hjálp á hesum øki. Tímarnir til serhjálp fækka, jú eldri børnini blíva. Soleiðis var tað, í hvussu so er hjá okkum. Men nú skal so sparast enn meira, tí vit hava brúkt ov nógv. Ja tað er so sanniliga til at undrast yvir. Allir flokkar skrivaðu um tey veiku í samfelagnum áðrenn løgtingsvalið og um børn við serligum tørvi, hvussu nógv betur tey skuldu fáa tað. 'Sågar' løgmaður, sum sjálvur er lærari. Vit minnast tann politiska fundin úti á læraraskúlanum, har ein ørkymlað mamma skeldaði løgmann út, um tað sama. Hon var flutt til Føroya úr Danmark, og var ógvuliga ørkymlað, tí hon ikki fekk neyðuga hjálp til sonin hjá sær. Løgmaður sá púra ovfarin út og var absalutt samdur við konuni. Jenis av Rana segði, "jamen hví hevur tú ikki kontaktað onkran av okkum politikarum, tað er jú tað vit eru til"? Eg hugsaði mítt. Valagn og einki annað!

Syrgið fyri at hjálpa okkara veiku í samfelagnum. Brúkið peningin, sum er settur av til kanning av, 'hví føringar í útlegd ikki koma heimaftur eftir lokna útbúgvingar', til at seta í verk tað tit lovaðu. Ein og hvør kann rokna út hví fólk ikki koma heimaftur á klettarnar - til hetta nýtist eingin kanningarnevnd. Vit eru eftirbátar á øllum økjum, sum viðvíkja trivnaðinum hjá fólkinum, so sum heilsu- social- og skúlaøki. Tað kann ikki taka langa og drúgva tíð at sammeta hesi viðurskifti við viðurskiftini í okkara grannalondum - politiska málið má meira vera, at vit taka tað besta burturúr, og veruliga hava tað sum ynski, at hesi tingini mugu raðfestast frammalaga.

Tað var ein sending í sjónvarpinum herfyri, við heitinum 'prát við psykologen'. Hesin hevði ymiskar aðrar útbúgvingar eisini, m.a. var hann eisini lækni.

Hann segði, at tá ið hann hevði fyrilestrar, til dømis um eitthvørt viðvíkjandi børnum, so vóru o.u. 90% av luttakarunum kvinnur.

Tá ið hann hevði fyrilestrar um hjartasjúkur, vóru o.u. 90% av luttakarunum menn.

Skeiva býtið í Føroyum millum menn og kvinnur í politikki sæst avgjørt aftur í politisku raðfestingunum, og nýggjasta dømi er - at hjálpin til børn við serligum tørvi, skal skerjast við 20%.

Vælsignaðu menn og kvinnur, "brótið upp ermar og raðfesti, so tað verður trivnaður hjá øllum í Føroyum!".

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.